

Føroysku umboðini til Embla Food Award. Fv. Jógvan Jón Petersen, Eva úr Dímun, Anna Rubeksen, Leif Sørensen og Gutti Winther.

# TÁ IÐ EMBLA HÁLSFEVNDI FØROYAR...

**Tað vórðu ikki minni enn tríggjar virðislønir til Føroyar, tá ið norðurlendska matvirðislønin varð handað á fyrsta sinni. "Hetta er ein staðfesting av, at vit hava nógv gott at bjóða í Føroyum," sigur ein av fegnu vinnarunum**

SKRIVAÐ HEVUR INGRID BJARNASTEIN
MYNDIR: EMBLA FOOD AWARD



Sjey flokkar. Fýra tilnevningar. Tríggjar heiðurslønir.

Føroyar stóðu eftir sum stóri vinnarin, tá ið norðurlendska matvirðislønin, Embla, varð latin á fyrsta sinni í august mánaði.

Norðurlendsku bóndafeløgini í Finnlandi, Svøríki, Íslandi, Danmark, Føroyum og Álandi hava sett á stovn matvirðislønina Emblu, sum hevur sjey ymsar flokkar.

Føroyingar vóru tilnevndir í fýra av teimum sjey flokkunum: Matsamskiftarin, Matferðamál, Rávøruframleiðarin og Mathandverkarin. Tilnevndu føroyingarnir vóru Gutti Winther, Heimablídni, Dímunargarður og Leif Sørensen.

### Sjóneykuna á tað norðurlendska

Embla virðislønin varð latin á samkomu á ráðhúsinum í Keypmannahavn í august í sambandi við ráðstevnuna "Better food for more people" hjá danska Umhvørvis- og matmálaráðnum. Dentur varð lagdur á, at tey, ið vóru tilnevnd, "eru við til at seta lit á norðurlendska køkin og sum heild gera meira burtur úr matgerð. Tey borðreiða norðurlendska køkin á einum silvurfati og geva okkum øllum hug til meira."

Súsanna Sørensen frá Visit Faroe Islands og Janus Vang stjóri á iNOVA sótu í dómsnevndini umboðandi Føroyar, eins og hini londini sjálvandi høvdu sínar dómsnevndarlimir.



Heimablídni hjá Onnu og Óla Rubeksen á Velbastað. Heitið "Heimablídni" stavar upprunaliga frá teimum.

Dagin fyri sjálva virðislønarhandanina vóru framløgur í hvørjum flokki sær, har dómsnevndarlimirnir løgdu fram um tey tilnevndu frá sínum landi. Fimm minuttir vóru settir av til hvørja framløgu, og eftir tað var ein minuttur til spurningar. Síðan skuldu dómsnevndarlimirnir geva stig millum 1-8 eftir nøkrum frammanundan avgjørdum treytum sum til dømis, hvussu originalt tað var, hvussu norðurlendskt, burðardygt og so framvegis.

Súsanna Sørensen legði fram um Matferðamál og Matsamskiftaran, og Janus Vang um Rávøruframleiðaran og Mathandverkaran.

"Báðar framløgurnar gingu væl, og serliga aftan á framløguna um Heimablídni spurdu tey sera nógv og vóru forvitin, so eg hevði eina góða kenslu. Men tú veitst jú sjálvandi ongantíð, hvussu tað fer at ganga, tí hini tilnevndu vóru eisini góð," greiðir Súsanna Sørensen frá.



Tey tilnevndu í flokkinum "Matsamskiftarin". Poul Michelsen, landsstýrismaður í vinnumálum, handaði virðislønina.

Til sjálvt hátíðarhaldið á Ráðhúsinum í Keypmannahavn vórðu øll tey tilnevndu til staðar umframt dómsnevndarlimir, gestir, virðislønahandarar og onnur.

"Øll vóru spent, og tú merkti, at hetta hevði okkurt at siga fyri fólk. Tað var sannur veitslurómur í høllini; hvørt landið hevði fingið sítt borð við flaggi á, og so hvørt sum vinnararnir í hvørjum flokki skuldu avdúkast, fóru øll tey tilnevndu upp á pallin. At Føroyar so ruddaðu borðið og fóru av stað við trimum virðislønum, høvdu vit als ikki væntað. Eg náddi at hugsa, at vit eru rættiliga kul og sita við nøkrum, sum er framúrskarandi," fortelur Súsanna Sørensen, sum sjálvandi eisini var til staðar til virðislønarhandanina.

**Tríggir føroyskir vinnarar**

Tá ið kvøldið var av, stóðu tríggir føroyskir vinnarar á sigurspallinum. Dímunargarður, Leif Sørensen og Heimablídni.

Anna og Óli Rubeksen av Velbastað umboðaðu Heimablídnis-skipanina til tiltakið, og tey vórðu brúkt sum dømi í framløguni. Tey bæði vóru eisini millum tey fyrstu, sum fóru



Ein fegin Óli Rubeksen, tá tað gjørdist greitt, at Heimablídni-skipanin vann í flokkinum "Matferðamál"

undir Heimablídni, og heitið stavar frá teimum.





Leif Sørensen vann fyri síni vælumtóktu fiskakips.



Eva og Jógvan Jón saman við Torgerdur Katrin Gunnarsdóttir, fiskivinnu- og landbúnaðarráðharri í Íslandi.



Anna og Óli Rubeksen (uttast til høgru) umboðaðu Heimablídni-skipanina til Embla Food Award. Vinstrumegin stendur Camilla Grunell, føðslu- og umhvørvisráðharri í Álandi, sum handaði virðislønina.

"Tað eru fimm ár síðani, vit byrjaðu við Heimablídni. Vit eru bøndur og hava tí nógv at bjóða av egnum mati, og eisini vildu vit gagnnýta ta rávøruna, vit hava á garðinum. Alt, sum gestirnir fáa, er føroyskt. Tað mesta er frá okkum sjálvum, men tað, vit ikki eiga sjálv, keypa vit frá øðrum veitarum í Føroyum," greiðir Anna Rubeksen frá. "Grundleggjandi eru okkara tankar um matgerðina tvinnaðir saman við tí siðbundna og norðurlendska mat-




Eva úr Dímun, tá Dímunargarður vann í flokkinum "Rávøruframleiðarin 2017".

manifestinum um at gangnýta tað, vit eiga, í Norðanlondum."

Setir tú teg til borðs hjá Onnu og Óla, fært tú eina fimm-rætta matskrá. Feskt lambskjøt úr haganum hjá teimum báðum er fastur høvuðsrættur, og hinir rættirnir eru til dømis saltfiskur, seyðarhøvd og blóðpylsa, fiskasúpan, heimagjørd pylsa úr ærskjøti, neytakjøt frá grannagarðinum, umframt heimabakað breyð, heimagjørd rababarusaft og føroyskt øl.

"Vertskapurin og søguslóðin hevur nógv at siga bæði fyri føroyskar gestir og serliga, tá ið talan er um útlendingar. At kunna fortelja, at seyðurin hevur gingið í okkara egna haga, ella at saltfiskurin er gjørdur eftir einari gamlari uppskrift í familjuni hjá Óla, gevur bara nakað eyka," heldur Heimablídnisverturin á Velbastað.

Og tað eru ofta gestir á Velbastað. Í fyrstuni umleið eina ferð um mánaðin, men síðani hevur tað bara vundið upp á seg, og Anna Rubeksen heldur, at nú hava tey í miðal gestir eina ferð um vikuna. Bæði útlendingar og føroyingar koma á gátt.

"Vit halda, at hetta er hugaligt og spennandi at brúka okkara evni og hugflog, og okkum dámar tað væl. Útlendsku gestirnir



Til hátíðarhaldið á Ráðhúsinum í Keypmannahavn. Uttast til vinstru síggja vit nøkur av føroysku umboðunum.




Allir vinnararnir.

virðismeta eisini at sleppa at vitja í einum vanligum, føroyskum heimi og síggja, hvussu vit húsast," sigur Anna flennandi.

Anna og Óli Rubeksen umboðaðu, sum nevnt, júst Heimablídnis-skipanina, tá ið Embla-virðislønirnar vóru handaðar í august. Og tey fegnast, sum vera man, um viðurkenningina.

"Hetta er ein staðfesting av, at vit hava nógv gott og ektað at bjóða í Føroyum. Vit hava góðar rávørur og góð fólk, sum gera sítt besta," sigur Anna Rubeksen, sum letur væl at hátíðarhaldinum.

"Tað var eitt fantastiskt kvøld; vit fingu næstan ikki jørðsamband aftur. Vit høvdu sjálvandi vónað at vinna, men vistu, at kappingin var hørð. So tað var ordiliga stuttligt, og at Føroyar skuldu fáa tríggjar virðislønir, var eisini við til at gera tað til eina uppliving fyri lívið. Og so gevur ein slík virðisløn ikki minst eisini áræði til at halda fram við tí, vit gera," sigur Anna Rubeksen at enda.

Embla virðislønin verður latin annaðhvørt ár, og sostatt verður næsta virðislønin latin í 2019. Verkætlanin er stuðlað av Norðurlenska ráðharraráðnum við tí endamálið at styrkja felags norðurlendskan matsamleika og mentan, umframt at økja um áhugan fyri norðurlendskum mati uttan fyri Norðurlond.

**Embla*-virðislønin**

Til bar at tilnevna í sjey ymiskum flokkum:

Matur til børn og ung 2017:
Ongin føroysk tilnevning
Mativerkseti 2017:
Ongin føroysk tilnevning
Matur til mong 2017:
Ongin føroysk tilnevning
Matferðamál 2017:
Heimablídni
Mathandverkarin 2017:
Leif Sørensen, fiskakips
Matsamskiftarin 2017:
Gutti Winther
Rávøruframleiðarin 2017:
Dimunargarður

*Embla er navnið á fyrstu kvinnuni í norðurlendsku gudalæruni